Almanna- og Heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin

## Heimarøktin Vágar/ Norðstreymoy

**Sjúkrasystrar.**

**Heimasjúkrasystrastarv:**
Í sambandi við at vit byrja uppá skipaða kvøldrøkt í Øki 2. (Vágarnar), verður við hesum søkt eftir heimasjúkrasystir at arbeiða í skiftandi vaktum, 35 t. um vikuna frá 15. mai 2000 ella eftir nærri avtalu.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara, tlf. 333249.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 2. mai 2000, kl. 14.00.

Føroya Sjómansskúli
Postboks 104, FO-110 Tórshavn
Tel.: +298 311749 Fax: +298 318122
e-mail: farnav@farnav.fo

## Avloysarastarv sum sjómansskúlalærari

Søkt verður eftir lærara sum avloysara til Føroya Sjómansskúla fyribils frá 1. august 2000 til 31. desember 2000 við møguleika at halda fram.

Vit kunnu bjóða:
- Eitt spennandi starv í einum sera góðum umhvørvi, bæði tá tað snýr seg um fysiskar karmar og samstarv ímillum leiðslu, lærarar og næmingar.

Førleikakrøv:
- Hægstu nautisku útbúgving.
- Kunna undirvísa í náttúrlæru, el-læru, skipstøkni og enskum.
- Praktiskar royndir sum yvirmaður í útisigling.
- Hava góðar samstarvseginleikar.
- Hava góðar royndir innan teldubrúk.

Setanarviðurskifti:
Starvið er sáttmálasett millum Fíggjarmálastýrið og Fakfelag Sjómansskúlalærara.

Umsóknir skulu sendast til:

**Føroya Sjómansskúla**
Nóatún 2
Postboks 104,
FO-110 Tórshavn

í seinasta lagi mánadagin 1. mai 2000.

## Útróðrarbátur til sølu

M/B Havfari 32 ton og egningarskúrur á Stongunum við 120 svøvla línum og 10 aut. snellum, fiskiloyvi í bólki 4a, 30 dagar á Føroya Banka, snelluloyvi í Íslandi, til sølu fyri 950.000 kr.

**Tlf. 457735**

## Pedagogur

Undir Almanna- og Heilsumálastýrinum og stovnum undir tí, við fyribils tænastu í eitt ár á Bústovninum við Garðavegin í Klaksvík er eitt starv sum sáttmálasettur pedagogur leyst til setan 1. mai ella eftir nærri avtalu.

Bústovnurin við Garðavegin er ein verkætlan varandi inntil nýggi bústovnurin í Klaksvík verður tikin í nýtslu væntandi á sumri 2001. Á stovninum búgva 2 autistisk børn fast umframt at stovnurin skal virka sum umlætting fyri aðrar autistar í Norðoyggjum.

Tað er ein fyrimunur hjá umsøkjaranum at hava vitan um autismu og serligu arbeiðshættirnar, sum krevjast til hetta brekið. Ítróttur er ein týdningarmikil partur av arbeiðinum m.a. renning og svimjing, og tí krevst at umsøkjarin er væl fyri kroppsliga.

Arbeiðstíðirnar fevna um morgun-, kvøld- og náttarvaktir.

Starvið er pedagogstarv, sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið, men um eingin egnaður pedagogur søkir verður starvið sett við fólki uttan pedagogútbúgving.

Nærri fæst at vita um starvið frá fyristøðufólkinum á tlf. 456310.

Umsóknarfreistin er 29.04.00 og skulu umsóknir saman við prógvi, viðmælum v.m. sendast til:

**Bústovnurin á Garðavegi 38**
FO-700 Klaksvík

## Vestmanna Arbeiðarafelag

Aðalfundur felagsins verður í Bygdarhúsinum 3. mai kl. 19. Um aðalfundurin ikki er viðtøkuførur verður eykaaðalfundur hálvan tíma seinni.

**Vestmanna Arbeiðarafelag**

**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

Fróðskaparsetur Føroya

## Búskaparfrøðingur

**Undirvísingar- og granskingarstarv á Søgu- og Samfelagsdeildini.**

Eitt undirvísingar- og granskingarstarv í búskaparfrøði er leyst á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya við setan frá 1. august 2000 ella skjótast gjørligt. Starvið er liður í uppbygging av fakligum førleika í búskaparfrøði.

**Gransking**
Á Søgu- og Samfelagsdeildini skal búskaparfrøðilig gransking mennast. Granskingin á deildini fer fram í søgu, síðsøgu og samfelagsvísindum. Granskingarvirksemið hjá tí, ið settur verður, verður í stóran mun at laga eftir tí serkunnleika, ið viðkomandi hevur.

**Undirvísing**
Undirvísing á Søgu- og Samfelagsdeildini í búskaparfrøði fer fram á ársnámum og á serligum evnisskeiðum. Ætlan er harumframt at skipa fyri BA-útbúgving, har høvuðsdentur verður lagdur á búskap. Undirvísingararbeiðið fevnir um undirvísing, dagføring av skeiðsætlanum, fyriskipan av próvtøkum og samskifti við leysalærarar og próvdómarar.

**Førleikakrav**
Umsøkjarar mugu í minsta lagi hava kandidatútbúgving ella tilsvarandi í búskaparfrøði. Umsøkjarar við vísindaligum starvsroyndum í búskaparfrøði hava fyrimun.

**Metingarnevnd**
Sett verður ein metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi raðfestingina av øllum umsøkjarunum og metingina um egnan førleika.

**Umsóknir**
Umsóknir við ævilýsing (curriculum vitae), avritum av próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, serprentum og avritum av vísindaligum ritgerðum (í 4 eintøkum) mugu vera Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. mai 2000.

**Lønar- og starvsviðurskifti**
Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan
Handan Á 5 • 100 Tórshavn

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



# Páskafrí og umvæling av verkstaði

## Mekaniski verkstaðurin verður stongdur frá 19.04.00 til og við 25.04.00

Sosialurin - 311820

**REYNI SERVICE**




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

## Havnameistari til Sørvágs Havn

Søkt verður eftir havnameistara til Sørvágs Havn.

Kravdir eginleikar: Arbeiðssemi og nærlagni og harafturat er tað ein treyt at hava navigatørútbúgving.

Starvssetanin, arbeiðstíðin, løn og frítíðarskipan verða sambært sáttmála millum Føroyar Skipara- og Navigatørfelag og Sørvágs Kommunu.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

Meira fæst at vita um arbeiðsøki og nærri arbeiðsásetingar við at venda sær til skrivstovuna tlf. 332004/333122.

Møguligar umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum við frámerki: »Umsókn havnameistari« skulu vera Sørvágs Kommunu í hendi í seinasta lagi 25.04.2000 kl. 12.00.

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir ella eisini onga at taka.

**Sørvágs Kommuna**

*Vit hava tær vælumtóktu íslands-snellurnar DNG og íslands-rullurnar umframt LINE TEK stýringar*



**JÓANNES DAHL**
460 Norðskáli
Tel. 22 10 00 / 42 22 74
Fax 42 21 89

Sosialurin - 311820

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

# 2000 Páskastevnan

í Ítróttarhøllini á Hálsi
20. - 24. apríl

**Høvuðstalarar á páskastevnuni verða Eivind Frøen úr Noreg og Gordon Hickson úr Onglandi.**

**Skírhósdag**
kl. 18 Skrúðgonga av Vaglinum niðan í Ítróttarhøllina á Hálsi um viðrar.
kl. 19 Møti við Eivind/Gordon

**Langi fríggjadagur**
kl. 9.30 Morgunmøti við Eivind/Gordon
kl. 15 Møti við Eivind/Gordon
kl. 19 Møti við Eivind/Gordon

**Leygardagur**
kl. 19 Møti við Eivind/Gordon
kl. 22 Lovsangskvøld við Jan Honningdal

**Páskadagur**
kl. 9.30 Morgunmøti við kvinnum
kl. 15 Familjumøti
kl. 19 Møti við Eivind/Gordon
kl. 22 Gospeltiltak við Heina Lützen og Regini Guttesen

**2. páskadagur**
kl. 9.30 Morgunmøti við monnum
kl. 17 Møti við Eivind/Gordon

**Øll eru hjartaliga vælkomin!**

Meinigheitin í Hoyvík

# SETEPLIR

## Vit hava 5 ymisk sløg av set á goymslu

MBM FÓÐUR

**Kollafjørður**
Tlf. 42 14 78

**Tórshavn**
Vegurin Langi
Tlf. 42 13 00

Sosialurin - 311820

**www.sosialurin.fo**